# Digitalir lundar og 45 seiðir størsta upplivingin

*Tað byrjaði við, at ein lærari settist at rógva út á alnótini. Tað endaði við við fiskitúri í Nólsoyarfirði. Í vikuni hava næmingar úr serskúlaflokki í Gotlandi vitjað næmingar á Sernámsdeplinum*




*Ein serskúlaflokkur úr Gotlandi hevur vitjað ein flokk á sernámsdeplinum og tey hava kent seg sera væl móttiknan. Mikudagin vitjaðu lærarar og næmingar á Sosialinum*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

DAGFINN OLSEN

Leygardagin komu 7 næmingar úr einum serskúlaflokki í Gotlandi á vitjan í Føroyum. Við í fylginum eru lærarar teirra og tey hava vitjað ein flokk á Sernámsdeplinum í Havn. Tey koma úr einum skúla í Gotlandi, har 750 næmingar ganga. 50 teirra eru serskúlanæmingar.

### Hittust á netinum

Kjartan Clementsen hevur tikið sær av gestunum, saman við Arnold Eyvindsson.

Tað kann tykjast løgið, men lyklaorðini í hesi søgu eru nót og at rógva út.

Startskotið var, at Kjartan Clementsen var á Tessskeiði og kom á alnótini, ella internetinum, í samband við flokkin í Gotlandi, tá hann róði út á alnótini.

Alt hetta endaði við, at næmingar og lærarar úr Gotlandi nú hava vitjað í Føroyum, har ein fiskitúrur í Nólsoyarfirði hevur verið millum heilt stóru upplivilsini.

Umframt at vitja Í Kirkjubø, Elduvík, Norðurlandahúsinum, við Gjógv og á Tinganesi, so fóru tey upp á takið á Hotel Hafnia, fyri at njóta útsýnið. Har fingu tey eisini lunda at smakka, umframt at tey hava roynt bæði turra grind og turran fisk.

Men tað vóru lundarnir, ið festu seg hjá næmingunum úr Gotlandi og teir avgjørdu, at lundafugl máttu teir uppliva.

### Digitalir lundar

Og tískil varð farið ein túr í Nólsoyarfjørð og út ímóti Glyvursnesi. Dorg var við og tað eydnaðist at síggja lunda, sum beinanvegin varð avmyndaður við digitalum myndatólum, so myndin kann goymast á teldu.

Spyr ein næmingarnar, hvat størsta upplivingin á ferðini í Føroyum hevur verið, so svarar lítla Anna, at tað avgjørt eru lundarnir, og at hon nú er fiskiserfrøðingur. Fongurin í Nólsoyarfirði var nevniliga 45 seiðir.

Og hinir næmingarnir eru samdir við Onnu. Lundarnir og fiskitúrurin standa ovast á breddanum. Sjálvt tað, at flúgvast skal 3 ferðir, fyri at koma til Føroya, er einki aftur ímóti at fáa sær eitt kók í Nólsoyarfirði.

### Góðir stuðlar

Fyri at ferðin til Føroya kundi gerast veruleiki, so mátti sparast saman og arbeiðast, tí peningur skal til.

Foreldur hava latið lutir, so at næmingarnir úr Gotlandi kundu selja lutaseðlar. Næmingarnir hava eisini spart saman, arbeitt og selt fløskur.

Men stuðul frá lokalum feløgum hevur munað væl, eins og stuðul frá Lions Club, Foreningen Norden, Rotary, Odd Fellow, kirkjuni og øðrum hevur avgjørt eisini hevur verið við til at gjørt ferðina møguliga.

Nú vóna føroysku vertirnir, at tað fer at gangast teimum líka væl at skava pening saman og at finna stuðlar, tí ferðin í Føroyum hevur verið væleydnað og føroysku vertirnir kundu hugsað sær at vitjað í Gotlandi.

Gestirnir úr Gotlandi eru á einum máli um, at í Føroyum hava tey verið væl móttikin. Tey fóru avstað aftur við flogfari í gjár og skuldu flúgva 3 ferðir, fyri at koma heim, men eftir í minninum stendur upplivingin av at hava flotið á Nólsoyarfirði og óivað koma digitalir lundar á teldurútin í Gotlandi, tá næmingarnir koma aftur í skúla.

# Per Kirkeby arbeiðir í Føroyum



*Heimskendi danin Per Kirkeby arbeiðir í løtuni í Grafiska Verkstaðnum í Listaskálanum og leygardagin verður framsýning*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

*Heimskendi danski listamaðurin Per Kirkeby arbeiðir á verkstaðnum í Listaskálanum í hesum døgum. Leygardagin letur framsýning upp*

DAGFINN OLSEN

Tað er ikki júst ein og hvør, ið heldur til á Grafiska Verkstaðnum í Listaskálanum í hesum døgum. Tað er nevniliga heimskendi danski listamaðurin Per Kirkeby, ið hevur tikið av innbjóðing frá Listaskálanum.

Hann starvast nú á verkstaðnum í húsinum og verkini verða hongd upp, so hvørt tey eru liðug. Leygardagin klokkan 16 letur so upp framsýning við tekningum, pastellum, guasjum og monoprentum eftir Per Kirkeby. Hann verður sjálvur hjástaddur.

Per Kirkeby er føddur í Keypmannahavn í 1938. Hann er málari, myndahøggari, grafikari, rithøvundur og skald, og er ivaleyst ein tann gitnasti norðurlendski listamaðurin í dag.

Hann hevur havt stórar einkarsýningar í teimum fremstu listaskálum, m.a. Tate Gallery. Hann er umboðaður á flest øllum stórum listasøvnum, serstakliga í Týsklandi. Í Danmark er hann m.a. umboðaður á Louisiana.

Per Kirkeby hevur fingið mangar heiðurslønir, professari við listaakademiið í Karlsruhe 1978-89, frá 1989 í Frankfurt. Umframt hevur virkni listamaðurin givið út langa røð av bókum, serliga esseysøvn, skaldsøgur, yrkingasøvn, listabøkur og hann hevur eisini gjørt filmir.

Við á Grafiska Verkstaðnum er grafiski tøkningurin Michael Schæfer, ið greiðir frá um týska gróti, ið er heilt serligt, og sum verður nýtt í framleiðsluni á verkstaðnum, at bert ein av hesum steinum kostar eini 14.000 krónur, skal hann keypast. Steinurin hevur serligar eginleikar og tolir ella heldur m.a. feitti. Schæfer sigur, at ikki er long tíð síðani, at slíkt var vanligt í t.d. blaðframleiðslu og at hann í sínum ungu døgum sá slíka framleiðslu til reklamuprent. Hetta var í 1969.

Per Kirkeby hevur roynt at hugt seg um á ferðini í Føroyum og teknar tað, ið hann hevur sæð.



# Hatta eigur ein at tosa við sín prest um

*Í Fimmaranum í ÚF mikukvøldið førdi lurtari úr Klaksvík fram, at prestarnir har prædika kirkjuna tóma. Sóknarpresturin Niels Pauli Danielsen avvísir hesum og heldur annars, at slíkt hoyrir ikki heima í útvarpinum, men at slíkt prátar ein við sín prest um*

DAGFINN OLSEN

Í samband við, at nakrir prestar í Føroyum hava noktað donskum bispum at prædika í sínum kirkjum, var kjak í útvarpssendingini Fimmarin mikukvøldið.

Í Klaksvík hava prestarnir noktað donskum bispi at prædika. Í Fimmaranum førdi lurtari úr Klaksvík fram, at har hava prestarnir prædikað kirkjuna tóma.

Hesum vísir sóknarpresturin Niels Pauli Danielsen aftur.

– Í Klaksvík er góð kirkjugongd og fólk møtir væl upp. Í Klaksvík hava vit oftari altargongd, enn nakra aðrastaðni. Tað ber til at telja talið av teimum, ið koma til altars, og hetta hevur verið siður í Klaksvík. Vanligt var her at meta soleiðis, at 1/4 fer til altars og tað koma yvir 100 til altars, tá altargongd er, vísir Niels Pauli Danielsen á.



*Niels Pauli Danielsen er ósamdur við teimum, ið føra fram, at hann prædikar kirkjuna í Klaksvík tóma. - Men tað er nokk rætt, at tað eru fólk, ið vilja hava tað til tað, at talið er minkandi, sigur hann* **(savnsmynd)**

### Ikki minkandi

Niels Pauli Danielsen metir ikki, at talið á teimum, ið vitja kirkjuna, er minkandi.

– Tað haldi eg ikki, tað er. Tað er góð kirkjugongd og altarborðið verður væl vitjað. Tann, ið sigur nakað annað, hann vil hava tað at minka. Men tað er nokk rætt, at tað eru fólk, ið vilja hava tað til tað, at talið er minkandi. Og tey royna at agitera fyri, at tað skal minka, sum lurtarin, ið ringdi inn til Fimmaran, sigur Niels Pauli Danielsen.

### Undirskriftirnar

Í Fimmaranum kom eisini fram, at fólk í Klaksvík eru farin at savnað inn undirskriftir, fyri at loyva danska bispinum framat í kirkjuni har.

Niels Pauli sigur til hetta, at í øllum hesum verður gloymt, at tað er kirkjuráðið á staðnum, ið hevur samtykt, at danski bispurin skal ikki innar í kirkjuna at prædika.

– 6 av 8 kirkjuráðslimum hava samtykt at heita á prest, sum í hesum førinum eri eg, um at heita á bisp, at Karsten Nissen ikki kemur at prædika. Eg fylgi bert tilráðingini frá kirkjuráðnum og stuðli henni, sigur Niels Pauli Danielsen, sum samstundis avvísir, at hann hevur heitt á kirkjuráðið, men vísir á, at tað hinvegin er kirkjuráðið, ið hevur heitt á seg.

– Savnar fólk nú undirskriftir, so er tað ímóti kirkjuráðnum, vísir Niels Pauli Danielsen á.

### Samkoma í tvíningum

*Men er tað ikki keðiligt sum prestur at vita sær, at samkoman er í tvíningum?*

– Í einum so stórum býi, sum Klaksvík, har størri parturin hoyrir til kirkjuna, har ført tú ongantíð øll at verða samd. Hjá teimum prestum, ið vildu loyvt donsku bispunum at prædika, eru sanniliga heldur ikki øll samd. Har eru eisini fólk, ið eru samd við okkum, heldur enn teimum. So vit kenna tað ikki petti øðrvísi, enn teir munnu kenna tað. Hjá teimum eru eisini meinigheitsráð, ið seta seg ímóti, at teir binda kirkjuna at vera fyri, at donsku bisparnir prædika, sigur Niels Pauli Danielsen.

Hann er heldur ikki nøgdur ella samdur við, at ført hevur verið fram, at Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer hava bert eina kirkju.

– Tað hevur staðið í bløðunum, at Bergur Debes Joensen, Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer hava bert tvær av 60 kirkjum. Tað er jú skeivt. Í okkara prestagjaldi eru 5 kirkjur, umframt Christianskirkjuna. Verða okkara kirkjur lagdar afturat teimum hjá Bergi, so eru 10 kirkjur. Og so verður niðurgjørt, at sjúkrahúspresturin eisini er samdur við okkum. Hann er eisini prestur við Dómkirkjuna og hevur eisini nakrar kirkjur aftanfyri seg. Um hinir prestarnir eiga sínar kirkjur og kunnu binda tær, so eigur sjúkrahúspresturin eisini part av Dómkirkjuni. Í alt vil tað siga, at minst 14 av 60 kirkjum, taka undir við okkum, sigur Niels Pauli Danielsen.

Niels Pauli Danielsn er heldur misnøgdur við, at hann ikki kann svara bispi hampuliga aftur, uttan at hesin fer í bløðini við hesum.

– Hetta er alt ógvuliga óheppið. Og hvør fer í bløðini við hesum? Eg eri ikki farin í bløðini. Eg eri spurdur av bispi og svari, men hann øsir bløðini upp ímóti okkum. Tað er standurin í kirkjuni í løtuni, sigur Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur í Klaksvík.

STH

Føroya Handilsskúli søkir eftir

**LEIÐARA TIL SKEIÐTÆNASTU HANDILSSKÚLANS**

STH er deild av sjálvsognarstovninum Føroya Handilsskúli. Føroya Handilsskúli fevnir um 6 deildir, í Tórshavn, á Kambsdali, í Klaksvík, í Vágum, í Suðuroy og STH.

STH-leiðarin hevur vegna stjóran ábyrgdina av pedagogisku, umsitingarligu og fíggjarligu leiðsluni av deildini.

**Endamálið hjá STH er at:**

- Verða við til at betra um førleikan hjá starvsfólkum innan skrivstovu og handli.
- Skipa fyri eftirútbúgving og skeiðum fyri leiðarum á virkjum og almennum stovnum.
- At ráðgeva í málum, sum liggja innanfyri útbúgvingarøki handilsskúlans. Virkisøkið hjá STH eru allar Føroyar.
- Geva vitan, sum lærarar á skúlanum hava, út til starvsfólk í vinnulívinum.
- Draga vitan og royndir frá fólki í vinnulívinum inn á skúlan og kanalisera hesa vitan út til starvsfólk í vinnulívinum, har tørvur er á tí.
- Betra samband skúlans við vinnulívið - alment sum privat.
- STH verður eitt natúrligt amboð hjá vinnuni og almennum stovnum at nýta í strembanini eftir at vaksa um førleikan hjá medarbeiðarunum og varðveita fjølbroytni í starvsfólkahópinum.
- Vera við til at menna føroyskt virksemi bæði heima og uttanlanda.

**Vit vilja hava ein persón sum dugur at:**

- samskipa arbeiðið á deildini
- samskifta við undirvísarar og skeiðskiparar og viðskiftafólk
- evna nýggj skeið
- lofta nýggjum hugskotum og seta tey í verk
- kanna tørv á nýggjum skeiðum
- lurta og fáa fram tað, sum vinnan og tað almenna hava tørv á av nýggjum skeiðum og evna nýggja tørvin til ítøkilig skeiðstilboð fylgja við alla tíðina um og nær nýggjur tørvur stingur seg upp
- ráðleggja skeiðini og arbeiðið annars á deildini
- at útvega nýggj fólk at skipa fyri skeiðum
- at skipa fyri neyðugari pedagogiskari eftirútbúgving av skeiðskiparum, sum ikka hava pedagogiska útbúgving

**Skal:**

- kunna selja skeið
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- kunna virka í góðum samstarvi við starvsfólkið á skúlanum og viðskiftafólk
- duga at samskifta
- duga væl at skriva og málbera seg á føroyskum
- vera kreativur
- duga enskt

Arbeiði er sjálvstøðugt, fjølbroytt og avbjóðandi. Í dagliga yrkinum hevur skeiðleiðarin samband við nógv fólk. Fyrimun hava tey, ið hava leiðsluroyndir.

STH starvast umframt leiðarin eitt skrivstovufólk, lærarar á skúlanum partvís og aðrir skeiðsskiparar, sum annars ikki hava sítt dagliga yrki á handilsskúlanum.

Starvið er fulltiðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ragnar Magnussen tlf. 317177

Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og skulu verða Føroya Handilsskúla Marknagilsvegi 77, postsmoga 177, Tórshavn í hendi seinast 7. juni.

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, FHS 2.part, hægri handilsskúla, stakroyndir, merkonom, Datanom, teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Tel: 317177, Fax: 313374